## Brúktur Toyota Camry 2,2 Aut.



**Toyota Camry 2,2 Aut.**
Árg. sept. 95 Km. 92.000 Kr. 158.000,-
Aut. gear, serv. stýring, sentr. lás v.m.
í sera góðum standi.
**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo



## Brúktur BMW 523i
bilurin er í sera góðum standi



**BMW 523i**
Árg. 03/96 km.108.00 kr. 280.000,-
Bilurin er í sera góðum standi.
Bilurin hevur nógva orginala eykaútgerð, so sum
Anti spin, klima aut., 6xcd boks, fjarst. sentrallás,
sleipi krók, tví deilt setur aftan, ski posa,
alu felgur og eyka sett av felgum v/dekkum v.m.
(eyka útgerð fyri ca. 75.000,-)
**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo



## Bryggjudansur
Leygarkvøldið 1. juni skipar Tórshavnar Bátafelag aftur fyri tí vælumtókta Bryggjudansinum í Vágsbótni við bæði føroyskum og enskum dansi.



Kaffi, sodavatn og okkurt til matna fæst til keyps

**Tórshavnar Bátafelag**


# Fuglfirðingur og Gullborg til Íslands á kalvaveiði

**- Væntandi verða skipini á kalvaveiði til ólavsøku, sigur reiðarin, Jón Nolsøe Olsen.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Línubátarnir, Fuglfirðingur og Gullborg, sum báðir liggja á Fuglafirði og rigga til, fara í hesi vikuni til Íslands á kalvaveiði.

Jón Nolsøe Olsen, reiðari, sigur, at væntandi fara skipini at fiska har yviri til ólavsøku.

Bæði skipini hava línuloyvi undir Føroyum, og bæði hava egningamaskinu. Fuglfirðingur fekk sína egningamaskinu í januar/februar í ár. Ein fittan part av árinum hevur Fuglfirðingur fiskað háv, meðan Gullborg hevur roynt við vanligari línu. Bæði skipini hava eisini kalvaloyvi undir Íslandi.

Reiðarin sigur, at skipini kunnu byrja at fiska kalva, 1. juni, og summartíðin er góð kalvatíð har yviri.



*Fuglfirðingur liggur á Fuglafirði og ger klárt at fara til Íslands á kalvaveiði. Skipari er Andrias Johannesen í Kaldbak.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ein túr í fjør

Fuglfirðingur var ein stuttan túr har yviri í fjør, og teir fingu fitt av kalva.

Prísurin er góður, og Jón Nolsøe Olsen er spentur uppá, hvussu hetta fer at ganga, tí neyðugt er ikki við teimum heilt stóru nøgdunum fyri at fáa hampiligt burtur úr til skip og manning.

# Fara ikki at arbeiða inni á norðoyastevnu

**- Vit fara ikki at standa og "stampa" langt út á fríggjadagin, sigur stjórin á Kósini, Adrian Dalsá**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Stjórin á størsta arbeiðsplássi í Norðoyggum, Kósini, ætlar ikki, at arbeiðsfólk hjá honum skulu arbeiða langt út á fríggjadagin, nú norðoyastevna verður komandi vikuskiftið.

- Jú, eg havi hugsað um stevnuna og ætli ikki, at fríggjadagurin skal gerast ov langur, sigur Adrian Dalsá.

Hann sigur, at gerst tað neyðugt, verður heldur arbeitt eitt sindur longri dagarnar frammanundan enn ov tætt uppundir stevnuna.

- Eg haldi ikki, at nøkur grund er fyri at standa og "stampa" langt út á fríggjadagin, sum stjórin á Kósini tekur til.



*Væntandi koma línubátarnir í Klaksvík inn til norðoyastevnuna.*

### Upsi frá Beta

Líkt er tó ikki til, at hendan vikan verður øðrvísi enn aðrar á Kósini.

- Mánadagin høvdu vit nakað av upsa niðurfyri, sum vit hava keypt frá P/F Beta.

Annars vænta vit, at línubátarnir koma inn í vikuni. Koma teir ov tætt uppundir vikuskiftið, er ikki óhugsandi, at nakað av fiski kemur at liggja niðurfyri til vikuna eftir.

Adrian Dalsá væntar annars, at nóg mikið verður at takast við á Kósini alla hesa vikuna.



# Einasta krabbaskip í Føroyum fær ikki loyvi at veiða krabba

**Borðoyarnes er einasta skip í Føroyum, sum hevur verksmiðju til virking av krabba, men Fiskimálastýrið vil ikki geva eigarunum loyvi at veiða krabba, tí tey meta, at nóg mikið av krabbaloyvum longu eru givin.**

**- Hóast einki skip er á krabbaveiði undir Føroyum, noyðast vit nú at fyrireika okkum til at fara aftur til Grønlands, sigur ein undrunarsamur og vónsvikin reiðari, Jón Nolsøe Olsen.**

KRABBAVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*

Jón Nolsøe Olsen, sum er reiðari á krabbaskipinum, Borðoyarnesi, skilir ikki, hví Fiskimálastýrið ikki vil geva teimum, sum eiga skipið, loyvi at veiða krabba undir Føroyum.

- Vit hava søkt um eitt slíkt loyvi einar tvær ferðir, men hava muntliga fingið at vita, at nóg mikið av loyvum eru givin til krabbaveiði undir Føroyum.

Henda støða undrar reiðaran almikið, tí einki skip er á krabbaveiði, og honum vitandi fyrireikar einki reiðarí seg til hesa veiði í løtuni.

- Tey reiðaríir, sum hava loyvi, hava eisini gjørt sínar royndir, men tær eydnaðust ikki nakað serligt.

Jón vísir tó á, at tær royndir, sum eru gjørdar, eru ikki gjørdar við skipum, sum hava krabbaverksmiðju umborð, og tað heldur hann er rættiliga avgerandi.

- Men eina slíka verksmiðju hevur Borðoyarnes, sum einasta skip í Føroyum, sigur hann.

### Søkja ikki aftur

Jón sigur, at Fiskimálastýrið hevur biðið teir, sum eiga Borðoyarnes, læna loyvi frá N.J. Mortensen á Tvøroyri ella Tór í Hósvík, men hetta vilja teir treyðugt.

- Vísir tað seg, at tað ber til at reka lønandi krabbaveiði undir Føroyum, vilja teir, sum eiga loyvini, sjálvsagt hava tey aftur, og tá standa vit aftur við ongum, sigur hann.

Eitt annað, sum undrar Jón, er, at eitt triðja krabbaloyvi eisini er givið, og tað er givið uppá Borðoyarnes.

- Vit, sum eiga skipið, hava ikki hetta loyvi, men aðrir menn, sum ikki eiga skipið. So, hetta er ein undarlig verð, leggur hann aftrat.

Jón sigur, at teir fara ikki at søkja Fiskimálastýrið fyri triðju ferð um krabbaloyvi undir Føroyum til einasta skip í flotanum, sum hevur krabbaverksmiðju.

- Vit eru givnir at søkja og fara nú at arbeiða fram ímóti at sleppa yviraftur til Grønlands, haðani skipið kom í august síðsta ár. Vit hava fingið kvotu har yviri, men ivasamt er, um vit sleppa at fiska undir føroyskum flaggi ella ikki, sigur reiðarin.



*Fiskimálastýrið vil ikki geva einasta skipi í flotanum, sum er útgjørt við krabbaverksmiðju, loyvi at fiska krabba undir Føroyum.*
*Tískil hevur Borðoyarnes ligið svínabundin við bryggju í Fuglafirði ein stóran part av tíðini, síðan skipið kom aftur úr Grønlandi í august mánaða í fjør.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Á Hattonbanka

Síðan Borðoyarnes kom aftur úr Grønlandi, hevur skipið í eina tíð verið vaktarskip í Norðsjónum, og um mánaðarskiftið apríl/-mai gjørdu teir eina roynd at veiða krabba í altjóða sjógvi á Hattonbanka og á Íslandsrygginum.

- Á Íslandsrygginum var einki á fáa. Hinvegin fekst nakað á Hattonbanka, men ikki nóg mikið til, at veiðan var lønandi, sigur Jón.

Hann vísir á, at reiðaríið eisini hevur søkt Fiskimálastýrið um loyvi at fara í altjóða sjógv á Flemmish Kap at royna eftir krabba, men heldur ikki har kundu teir sleppa.

- So, alt hetta er ógvuliga keðiligt og stórt spell, tá ið vit nú hava eitt skip, sum er útgjørt til krabbaveiði, sigur ein undrunarsamur og vónsvikin, Jón Nolsøe Olsen, reiðari.

# Træsúlur og snældur pynta húsini og garðin

**- Málið hjá mær er í fyrsta lagi, at vit ikki skulu síggja enn fleiri plastikrør fylt við betongi sum stólpar undir altanum, sigur Attli Tróndheim, ið umboðar norska verksmiðju, sum ger vakrar snaraðar træsúlur og snældur til eitt nú hús og garðar.**

HÚS OG GARÐAR
*Vilmund Jacobsen*

Føroyingar eru vanabundnir, og tað nýtist ikki at vera nakað ringt. Vit hyggja ikki altíð so lagt út um landoddarnar. Hetta kemur til sjóndar á nógvum ymiskum økjum.

Vit kunnu ikki siga, at sethúsini, vit byggja, øll eru eins í sniði, men sjáldan sært tú eini hús, sum eru heilt øðrvísi enn tey, ið standa uppat. Seinnu árini er hugflogið tó vorðið størri, og nú sært tú viðhvørt hús ella garðar, sum líkjast burtur úr hinum.

Føroysku fyritøkurnar, sum byggja sniðhús, bjóða tær vanliga nøkur ávís hús, sum tú síðan kanst velja ímillum. Hesi kunnu vera ymisk í skapi og útsjónd, men oftast kennir tú sniðið aftur og veit, hvør hevur bygt húsini.

Alt gott um hetta. Tað er ófført, at vit eiga føroysk feløg, sum hava síni egnu føroysku hús at bjóða út til búreisingar kring landið.



*Hesi húsini standa í Saltangará. Aaneslands-stólpar eru undir úthanginum, og lægri stólpar eru júst settir upp við trappuna.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen.*

### Plastikrør fylt við betongi

Men lítið skal mangan til fyri at gera tað, sum er gott, uppaftur betur. Sumt er sum pyntar og sumt er, sum skemmir.

Sært tú eitt stórt úthang, er vanligt at síggja fýrakantaðir stólpar halda úthanginum uppi, hóast snaraðir stólpar kundu verið nógv vakrari. Vit síggja eisini, at nøkur av húsunum, sum eru eitt sindur eldri, hava plastikrør fylt við betong uppundir altanuna. Hesi eru vanliga litað og ikki serliga vøkur á at líta. Hetta hugsa vit tó ikki stórvegis um, tí hetta er vanligt í Føroyum. Í øðrum londum er meira vanligt, at stólparnir eru snaraðir og vakrir á at líta. Teir prýða um tað, tú sært.

- Hyggur tú í timburhandlarnar kring landið, sært tú ongar snaraðar træsúlur og snældur, og spyrt tú, hví teir ikki hava slíkt á goymslu, verður sagt, at eingin eftirspurningur er eftir tílíkum í Føroyum.

Hetta sigur leirvíkingurin, Attli Tróndheim, sum umboðar norsku verksmiðjuna, Aaneslands Fabrikker a/s. Henda fyritøka ger nevniliga tað, sum vit ikki síggja so nógv til í Føroyum.

### Súlur ogsnældur

- Eg haldi, at snaraðu træsúlurnar ogsnældurnar eru áhugaverdar, og tær kunnu nýtast bæði úti og inni. Tilfarið er gran og fura og fæst bæði trýstimpregnerað og óviðgjørt – alt eftir, um hetta skal brúkast úti ella inni. Tú kanst eisini velja, um súlur og snældur skulu verða úr heilum træi ella laminerað, t.v.s. límað saman.

Attli sigur, at málið hjá honum í fyrsta lagi er at sleppa undan at síggja enn fleiri plastikrør fylt við betongi standa undir altanum.

- Eg haldi ikki, hetta er vakurt á at líta. Tí havi eg átikið mær at umboða hesa norsku verksmiðju í Føroyum, ið framleiðir vakrar snaraðar súlur og snældur, sum kunnu pynta nógv um hús og garð.

Hann sigur, at møguleikarnir eru nógvir, og hevur tú ynski um ávíst snið, sum tú velir sjálvur, er einki til hindurs fyri at biðja verksmiðjuna gera súluna ella snælduna eftir tínum ynski.

- Men hetta kostar so eitt sindur eyka, sigur Attli.

### Flaggstengur, bummar og mastrar

Men Aaneslands Fabrikker gera eisini træverk til garðar, altanir og trappur, flaggstengur, bummar og mastrar til skip og bátar.



*Eigarin av hesum húsunum í Søldarfirði hevur sett stólpar frá Aaneslands Fabrikker í Noregi undir úthangið.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Flaggstengurnar eru sermerktar á tann hátt, at tær hava eina fýrakantaða rót, sum gongur nakað upp; síðan er restin av stongini rund, sigur Attli.

Hann vísir á, at verksmiðjan kann gera stengur, bummar og mastrar, sum eru uppí 30 metrar til longdar og 60 cm. í tvørmát.

- Soleiðis hevur verksmiðjan gjørt bummar til norsk skúlaskip og mastrar til skip og bátar, sigur Attli Tróndheim.

Firmaið hjá honum eitur A. T. Sølan.